## Caterpillar sigur upp



Amerikanska stórfyritøkan Caterpillar, sum serliga er kend fyri sínar maskinur til byggivinnuna, hevur gjørt av at koyra heili 20.000 fólk til hús. Leiðslan sigur, at tey 20.000, sum eru 18 prosent av samlaða starvsfólkatalinum, verða koyrd til hús, tí sølan er minkað sera nógv í seinastuni. Nýggj tøl vísa, at virksemið í amerikonsku byggivinnuni í januar var tað minsta í 50 ár. Nýggja stjórnin ætlar at brúka nógvar milliardir dollarar til at útbyggja samferðslukervið, men tað er ivasamt, um tað fer at hjálpa Caterpillar, skrivar Ritzau.

## Sprint Nextel sigur 8.000 upp

Fartelefonfyritøkan Sprint Nextel skal spara 1,2 milliard dollarar í ár, og fyri at røkka sparingini hevur felagið gjørt av koyra 8.000 fólk úr starvi teir næstu tríggjar mánaðirnar. Sprint Nextel er triðstørsti fartelefonframleiðari í USA og og tey 8.000 eru umleið 14 prosent av tí samlaða starvsfólkatalinum hjá fyritøkuni. Sprint og Nextel vórðu lagdar saman í eina fyritøku fyri trimum árum síðani, men tað hevur víst seg at vera trupult at samansjóða virksemið hjá teimum báðum upprunaligu fyritøkunum.

# fiskastovnunum

stovnsrøkt – annars minka stovnarnir burtur í einki, ella nærum tað, so sum vit hava sæð tað við toskinum.

Tað er einki at ivast í, at Hjalti hevur grein í sínum máli. Tað vísir fiskiskapurin – ella mangul upp á sama – frá 1993-94. Tá minkaði veiðitrýstið ógvusliga, tí so nógv skip góvust vegna fíggjarliga trupulleikar, og eftir bert tveimum-trimum árum vuksu stovnarnir seg stórar og sterkar aftur.

– Vit síggja søguliga, at tað sama hendi bæði undir fyrra og seinna heimsbardaga, tá lítil fiskiskapur var. Tá vuksu stovnarnir heilt betýðiliga, og tá kríggið var av, vóru teir risastórir, vísir Hjalti í Jákupsstovu á.

### Summi skip mugu gevast

Avgerða myndugleikarnir at fylgja fiskifrøðingunum meira enn vit hava sæð seinnu árini, fer tað at hava við sær, at nógvir bátar og nógv skip verða noydd at gevast, men hetta er ein natúrlig og eisini neyðug avleiðing av, at tilfeingi er ov lítið til at uppretthalda einari vinnu við so stórari veiðiorku.

– Tekur mann um endan nú, og setur í verk eina skilagóða burðardygga veiðu, so ganga eini tvey ár, og so hava vit eina nógv sunnari og sterkari fiskivinnu, sigur stjórin á Fiskirannsóknarstovuni.

Hvør ið skal sleppa at fiska, og hvør ið skal leggja inn, vil Hjalti í Jákupsstovu ikki meta so nógv um, men hann staðfestir bara, at veiðitrýstið eftir toski er alt ov høgt, og so má tað annars vera upp til fíggingarstovnarnar at meta um, hvør ið skal sleppa at halda áfram í nøkur rak ár, og hvør ið skal steðgast, um altso politiska skipanin ger nakað við málið.

### Fiskidagaskipanin

Veiðitrýst-tilmæli frá fiskifrøðingunum er altíð minni enn tað, sum vinnan vil hava, og soleiðis vil tað altíð vera við verandi skipan, heldur Hjalti í Jákupsstovu.

– Vit hava eina dagaskipan, har fiskivinnan heilt natúrliga verður betri og betri til at brúka hvønn einasta fiskidag. Hetta er ein menning, sum skal vera í vinnuni, men samstundis ein menning, sum hevur ávirkan á skipanini, so at skilja at vit mugu leggja upp fyri effektivitetinum, tá vit mæla til fiskidagar næstu ferð, sigur Hjalti í Jákupsstovu.

– Økti effektiviteturin í vinnuni hevur sær, at tað vera færri fiskidagar til somu nøgdir, og hendan veruleika mugu vit fáa inn í skipanina, sigur hann.

Tað ljóðar so einfalt, tá Hjalti forklárar mær um hesi viðurskiftir, og tí er tað fyri mær eitt sindur løgið, at bæði reiðarar og summir politikarar hava so torført at skilja tað, men so er jú hetta við at biðja fólk fara niður í løn.

– Tað eigur nú ikki at vera so torført, um tey samstundis fáa at vita, at um tvey ár fáa tey nógv meira í løn, hugsi eg.

### Gransking

Fiskirannsóknarstovan er í dag fremsti granskingarstovnur í landinum. Tað eru onga aðrastaðni so nógv fólk við einari Phd-útbúgving, og fleiri starvsfólk eru ávegis. Í hesum døgum hoyra vit dagliga um tær sparingar, sum eru gjørdar á undirvísingar- og granskingarøkinum, men hetta sær ikki út il at hava rakt Fiskirannsóknarstovuna so meint, hvussu ber tað til?

– Játtanin til okkara stovn er so minkað við einari millión krónum, og tað er ikki meira enn rímiligt, at eisini vit skulu spara, tá nú øll onnur skulu, men annars er tað ein spurningur um raðfestingar, og á Fiskirannsóknarstovuni raðfesta vit gransking høgt, sigur Hjalti í Jákupsstovu.

– Málsetningurin hjá okkum er í longdini, at øll starvsfólk, sum arbeiða á økjum, har tað ber til, skulu hava eina Phd-útbúgving, og tað arbeiða vit so hart framímóti, leggur hann afturat.

Altso er granskingin ein fastur partur av virkseminum á Fiskirannsóknarstovuni, og tá framtíðarætlanir verða lagdar, verður støða tikin til hendan partin á sama hátt, sum tá alt annað verður lagt til rættis. Men hvussu við fíggingini av granskingini? Tað ber væl ikki til at fara í Fólkatingið eftir pengum hvørjaferð (Fiskirannsóknarstovan hevur júst fingið pengar til fýra Phd-granskingarætlanir úr Danmark).

– Vit hava seinnu árini troytt teir møguleikar, sum eru fyri at fáa fígging til granskingina, millum annað hava oljufeløgini stuðlað væl, eins og Granskingarráðið og Fiskivinnuroyndir hava verið góð við okkum, og tað vóna vit, at tey framhaldandi fara at vera, sigur Hjalti í Jákupsstovu.

### Fakta

Veiðutrýst verður í hesum høpi definerað sum tað, sum tú tekur í tali burturúr stovninum í mun til tað, sum er tøkt. Er t.d. 100 prosent veiðutrýst, so fiskar tú hvønn stert. Og fiskur veksur alla tíðina, men tann fiskur, sum tú tekur burturúr, veksur sjálvsagt ikki meira. Fiskar tú helvtina av stovninum eitt ár, og so aftur helvtina árið eftir, so er ikki meira enn 25 prosent av stovninum fyri tveimum árum síðani eftir.



*»Á vegginum í trappuni á veg upp hanga nakrir fiskar. Eg hugsi til stuttleika, hvør av hesum fiskum passar best til Hjalta í Jákupsstovu...«*

### Fólk støðast

Tað, at nógv arbeiði á Fiskirannsóknarstovuni verður mett út frá, umframt sett í eitt størri granskingarhøpi, hevur millum annað tað við sær, at fólk støðast væl.

– Tað er ikki stór útskifting av starvsfólki á stovninum, og tað hevur nakað við týdningin av arbeiðinum at gera. Ein stovnsmeting er til dømis ikki bara eitt tilmæli til ein landsstýrismann, men eisini ein partur í einari størri heild í at síggja, hvat hetta havøkið ber av fiski, og hvussu tað skiftir frá einum ári til annað, sigur Hjalti í Jákupsstovu.

– Tá gerast stovnsmetingarnar eitt klárt mál í sær sjálvum, og ikki bara eitt gott ráð til politisku skipanina, leggur hann afturat.

Virðingin fyri føroyskari fiskivinnugransking er eisini til staðar uttanlands. Sjálvt um Hjalti í Jákupsstovu er eitt sindur varin, tá hann verður spurdur um hesa virðing, tí tað mugu onnur – kanska serliga útlendingar meta um – so vísir hann millum annað á, at granskarar frá Fiskirannsóknarstovuni eru við í trimum ES-granskingarætlanum fyri tíðina, og tað høvdu teir ikki verið, um teir ikki vóru so dugnaligir og kendir uttanlands , sigur hann.

### Nýtt havrannsóknarskip

Eitt tað størsta ynski hjá Hjalta í Jákupsstovu fyri framtíðina hjá Fiskirannsóknarstovuni er eitt nýtt fiskirannsóknarskip. Nú er upp á tíðina, at Magnus Heinason verður skiftur út, heldur hann.

– Tað er heilt stórur tørvur á einum nýggjum skipi, tí tað er ikki bara tað, at verandi skip er 30 ára gamalt, tað er eisini so, at skipið bleiv bygt fyri 30 árum síðani út frá einari 20 ára gamlari filosofi um, hvat ein trolari er, sigur Hjalti í Jákupsstovu.

– Tað vil siga, at tankagóðsið aftanfyri skipið er 50 ára gamalt, staðfestir hann.

Tað eru nógv viðurskiftir, sum eru út av lagi vánalig umborð á Magnusi Heinson, og eitt tað mest sjónliga eru manningarumstøðurnar. Fólkið heldur til har frammi í skarpinum í tvey- og fýramans kømurum, men skal heilt aftur á reyv at loysa sær buksurnar.

– Tað er næstan sum fyrr í tíðina, tá man setti á lynningina, vísir Hjalti á.

Harafturat kostar tað nógv at viðlíkahalda eitt so gamalt skip, eins og tað í longdini kostar samfelagnum, tá mann ikki hevur møguleika at kanna og granska á sama støði, sum onnur lond, tí útgerðin hjá okkum er so vánalig, leggur Hjalti í Jákupsstovu afturat.

Til spurningin um eitt nýtt havrannsóknarskip skal byggjast av nýggjum ella tað er nóg mikið at umbyggja okkurt hóskandi skip, er Hjalti avgjørdur.

– Eitt spildurnýtt skip má til, tí annars er vandi m.a. fyri at vit missa fiskirættindi fyri nógvar milliónir, sigur hann.

Tað er nevniliga so, at Føroyar eru partur av tí pelagiska kompleksinunm, sum tey rópa tað – altso makrel, sild og svartkjaftur. Hesir stovnar ferðast, og við teimum veðurlagsbroytingum, sum henda, fara stovnarnir kanska at ferðast enn meira.

– Eru føroyingar ikki við í teimum altjóða kanningum, sum mugu gerast í sambandi við ferðamynstrini, so kann tað gerast torført at sleppa upp í part, tá altjóða kvotur skulu tillutast í framtíðini, vísir Hjalti í Jákupsstovu á.